Vinnuframagrunnurin Postsmoga 3079 Hoyvíksvegur 51 110 Tórshavn
Telefon 312794 Fax 316703
www.vfg.fo vfg@vfg.fo



Vinnumálaráðið
Tinganes
Postsmoga 377
110 Tórshavn
att: Atli Eiriksson

Tórshavn, tann 2006-03-23
J.nr.:

Hjálgt senda við ársroknskapin og grannskoðanarfrágreiðingina fyri 2005 hjá Vinnuframagrunninum til góðkenningar.
Stýrið fyri Vinnuframagrunnin hevur góðkent og undirskrivað ársroknskapin og grannskoðanarfrágreiðinga fyri árið 2005, á fundi 22. mars 2006.

Vinarliga
Vinnuframagrunnurin

Ólavur Arge, stjóri

Vinnuframagrunnurin

Grannskoðanarprotokoll

frá 22. mars 2006 viðvíkjandi
ársroknskapinum fyri 2005

Correspondent Firm of
KPMG International
a Swiss Cooperative

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

Heiðavegur 15 · Postboks 190
FO-600 Saltangará · Faroe Islands
Telefon +298 474 474
Telefax +298 474 475

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sp/f. no. 2732

VINNUFRAMAGRUNNURIN
Grannskoðanarprotokoll 11. mars 2006
viðvíkjandi ársroknskapinum fyri 2005

		SÍÐA
1.	**GRANNSKOÐAN AV ÁRSROKNSKAPINUM FYRI 2005**	**47**
1.1	Inngangur	47
1.2	Niðurstøða av framdu grannskoðanini - grannskoðanarátekning	47
2.	**FRAMDA GRANNSKOÐANIN FYRI 2005**	**47**
3.	**ROKNSKAPARFØRSLA OG INNANHÝSIS MANNAGONGDIR**	**48**
3.1	Bókhaldið og edv-skipanin	48
3.2	Innanhýsis mannagongdir og -eftirlit	48
4.	**SERLIG VIÐURSKIFTI OG VIÐMERKINGAR TIL ÁRSROKNSKAPIN FYRI 2005**	**48**
4.1	Rakstrarroknskapurin	48
4.2	Fíggjarstøðan	49
5.	**GRANNSKOÐAN AV VEITTUM OG SKYLDUGUM STUÐLI**	**50**
5.1	Játtan av stuðli	50
5.2	Játtaður, ikki útgoldin stuðul	51
6.	**ONNUR ARBEIÐI**	**51**
7.	**AÐRAR UPPLÝSINGAR**	**52**
7.1	Veðsetingar, eventualskyldur o.a.	52
7.2	Tryggingarviðurskifti	52
7.3	Eftirlit við gerðabókini hjá stýrinum	52
7.4	Roknskaparváttan stjórnarinnar	52
8.	**GRANNSKOÐANARVÁTTAN Í SAMBANDI VIÐ ÁRSROKNSKAPIN FYRI 2005**	**53**

1. GRANNSKOÐAN AV ÁRSROKNSKAPINUM FYRI 2005

1.1 Inngangur

Sum grannskoðari hjá Vinnuframagrunninum hava vit útint ta í løgtingslóg nr. 81, frá 8. mai 2001 umrøddu grannskoðan av ársroknskapinum fyri 2005.

Ársroknskapirnir trý tey seinastu árini hava víst niðanfyri uppsettu rakstrarúrslit, ogn og eginpening:

tkr.	2005	2004	2003
Nettoúrslit	925	664	3.007
Ogn til samans	60.200	58.729	53.450
Eginpeningur	51.794	50.869	50.199

1.2 Niðurstøða av framdu grannskoðanini - grannskoðanarátekning

Grannskoðanin av ársroknskapinum hevur ikki givið orsøk til atfinningarsamar viðmerkingar. Góðkennir stýrið ársroknskapin í verandi líki, geva vit roknskapinum eina grannskoðanarátekning uttan fyrivarni og uttan supplerandi upplýsingar.

2. FRAMDA GRANNSKOÐANIN FYRI 2005

Grannskoðanin er farin fram í sambandi við gerð av ársroknskapinum.

Í sambandi við grannskoðanina hava vit gjøgnumgingið og mett um innanhýsis mannagongdir og -eftirlit, herundir mett um hesi lúka tey krøv, ið lóggávan ásetur.

Grannskoðanin hevur fevnt um ymiskar sundurgreiningar av roknskaparupphæddunum fyri at finna sambandið teirra millum, eins og vit í ein ávísan mun hava tikið stakroyndir fyri at skjalprógva einstakar upphæddir í bókførsluni. Harumframt hava vit avstemmað ein stóran part av upphæddunum í figgjarstøðuni, eins og vit hava tryggjað, at roknskapurin samsvarar við bókhaldið.

Í sambandi við liðugtgerð av grannskoðanini hava vit biðið um, og fingið, eina váttan frá stjórn grunsins við upplýsingum um øki, sum eru torfør at grannskoða, herundir um eventualskyldur.

Framda grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til viðmerkingar:

3. ROKNSKAPARFØRSLA OG INNANHÝSIS MANNAGONGDIR

3.1 Bókhaldið og edv-skipanin

Føroya Gjaldsstova førir bókhaldið fyri Vinnuframagrunnin. Grunnurin nýtir harumframt m.a. journalskipan, tekstviðgerð og rokniarksfílar. Trygdaravrit verður tikið av lokalum edv-fílum 3 ferð um vikuna. Hesir trygdardisklar verða goymdir á øðrum staði enn í hølunum hjá Vinnuframagrunninum.

3.2 Innanhýsis mannagongdir og -eftirlit

Roknskaparreglugerð og váttanarreglur eru gjørdar fyri Vinnuframagrunnin.

Mannagongdirnar eru í stuttum hesar:

- Stjórin nýtir eksterna ráðgeving í sambandi við stuðulsumsóknir áðrenn hesar verða lagdar fyri stýrið til støðutakan og áðrenn útgjald av stuðli fer fram
- Vanligur rakstarkostnaður verður av stjóranum hildin innan fyri rakstrarjáttanina
- Serligur kostnaður og viðlíkahald verður lagt fyri stýrið til støðutakan
- Øll útgjøld íroknað lønir verða avgreidd um FLS útgjaldsskipanina

Vit hava við stakroyndum kannað eftir at innanhýsis mannagongdin verða hildnar í sambandi við umsiting av umsóknum, játtanum og útgjaldinum fyri Vinnuframagrunnin.

4. SERLIG VIÐURSKIFTI OG VIÐMERKINGAR TIL ÁRSROKNSKAPIN FYRI 2005

4.1 Rakstrarroknskapurin

Gongdin í rakstrinum er í høvuðsheitum víst niðanfyri:

tkr.	2005	2004	2003
11 Lønir v.m.	-690	-671	-637
14 Keyp av vørum og tænastum	-267	-440	-311
15 Keyp av útbúnaði, netto	0	-5	-17
16 Leiga, viðlíkahald og skattur	-190	-164	-121
75 Skráseting av keyps-mvg	-107	-142	-104
Útreiðslur og íløgur til samans	-1.254	-1.422	-1.190
21 Søla av vørum og tænastuveitingum	520	551	505
52 Eftirløn fráfarin stjóri	-69	-68	-64
53 Stuðul til vinnu	-4.044	-4.682	-4.136
67 Rentuinntøkur	1.022	1.285	1.220
Nettoútreiðslur til samans	-3.825	-4.336	-3.665
03.63 Játtan á løgtingsfíggjarlógini	4.750	5.000	6.672
Ársúrslitið	925	664	3.007

Søla av vørum og tænastuveitingum, 520 tkr.

Søla av vørum og tænastuveitingum fevnir um leiguinntøkur, 472 tkr. og umsiting av skipasmiðjustuðli, 48 tkr.

Leiguinntøkan stavar frá útleigan av størstapartinum av bygninginum við Hoyvíksvegin til Rúsdrekkasølu Landsins.

4.2 Fíggjarstøðan

4.2.1 Støðisogn

Grundøki og bygningur, 5.108 tkr.

Grundað á, at marknaðarvirðið á bygninginum við Hoyvíksvegin verður mett at vera hægri enn bókaða virðið, verður bygningurin ikki avskrivaður roknskaparliga. Bygningurin er ikki avskrivaður síðani í 1997.

Eingin tilgongd hevur verið í árinum. Í árinum eru útreiðsluførdar 164 tkr. yvir raksturin sum viðlíkahald av bygninginum.

Rakstrartól og innbúgv, 20 tkr.

Eingin tilgongd hevur verið í árinum av rakstrartólum.

Vit eru samd í virðisásetingunum av støðisogn, sum grunnurin hevur gjørt.

4.2.2 Tøkur peningur, 55.072 tkr.

Innistandandi peningur er avstemmaður við landsbankan, peningastovn og girostovu.

4.2.3 Eginpeningur

Gongdin í eginpeninginum hevur verið henda:

tkr.	2005	2004	2003
Eginpeningur, við ársbyrjan	50.869	50.199	47.177
Broytingar til stovnsfæ við ársbyrjan	0	6	15
Úrslit flutt til eginpeningin	925	664	3.007
Eginpeningur, við árslok	51.794	50.869	50.199

4.2.4 Millumrokning við landskassan, 6.258 tkr.

Við árslok 2005 eigur landskassin 6.258 tkr. tilgóða hjá Vinnuframagrunninum. Hetta millumverandi kemst av, at útgjaldingar leypandi verða framdar um kreditorskipanina hjá Gjaldstovuni vegna Vinnuframagrunnin.

5. GRANNSKOÐAN AV VEITTUM OG SKYLDUGUM STUÐLI

5.1 Játtan av stuðli

Mannagongdir

Sambært §1, stk. 1 í kunngerð nr. 142 frá 29. november 2001 um umsiting og virksemi hjá Vinnuframagrunninum, hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum staðfest stuðulsskipanir, sum seta reglur fyri hvørji endamál, undir hvørjum treytum og hvørji vinnugreinaøki serliga kunnu verða stuðlað.

Inntøkugrundarlagið hjá Vinnuframagrunninum er árliga játtanin á fíggjarløgtingslógini, umframt aðrar inntøkur, so sum rentuinntøkur v.m. og ársúrslitið hjá grunninum undanfarin ár.

Játtanin fyri árið 2005 var 4.750 tkr. Umsóknir um stuðul verða viðgjørdar av stýrinum, eftir tilmæli frá stjóranum. Í 2005 vóru 40 umsóknir viðgjørdar, harav 24 vóru játtaðar. Tá verkætlanin er liðug skal umsøkjarin senda inn uppgerð og stuðulin verður útgoldin. Samlaða útgjaldingin í 2005 var 5.374 tkr. (2004: 4.455 tkr.).

Í sambandi við at uppgerðirnar koma inn, verður støða tikin til møguliga restafturføring av ov nógv játtaðum upphæddum. Við árslok hevur stjórin gjøgnumgingið skyldugan stuðul, og við støði í ávegis og endaligum frágreiðingum frá umsøkjarunum mett um tørvin á afturføring.

Í 2005 eru 655 tkr. afturførdar av áður játtaðum stuðli av Vinnuframagrunninum.

Játtan í árinum

	Játtað í árinum kr.	Afturført kr.	Netto játtan kr.
Vinnuframagrunnurin:			
0.0 Vinnuframaátøk	1.100.000	-363.505	736.495
1.1 Menning av vørum og tænastum	883.408	-76.159	807.249
1.3 Menning av telduforritum og KT-loysnum	277.514	0	277.514
1.5 Menning av tænastum innan ferðavinnu	67.400	0	67.400
1.6 Nýskapandi verkætlanir	333.333	0	333.333
2.1 Vørumessur	1.526.825	-33.253	1.493.572
2.3 Sølufremjandi tiltøk og marknaðarkanningar	472.628	0	472.628
3.2 Patentumsóknir	37.950	-37.950	0
	4.699.058	-510.867	4.188.191

Grannskoðan

Í sambandi við grannskoðan hava vit við stakroyndum gjøgnumgingið mannagongdir og skjøl til taks í stuðulssakunum. Vit hava ongar viðmerkingar til gjøgnumgongdina og hava í øllum førum fingið nøktandi grundgevingar frá stjóranum upp á okkara spurningar.

5.2 Játtaður, ikki útgoldin stuðul

Tá umsóknir verða játtaðar, verða treytir settar, sum skulu gangast á møti áðrenn stuðulin kann útgjaldast.

Stjórin fyri grunnin gjøgnumgongur javnan eldri skyldugar játtanir fyri at meta um stuðul skal afturførast. Í roknskaparárinum eru afturførdar til samans 655 tkr. Afturføringar verða gjørdar í teimum førum har uppgerð vísir, at stuðul ikki skal gjaldast við fullari upphædd ella als ikki. Eisini í teim førum, grunnurin ikki hoyrir aftur frá umsøkjara og tíðarfreistin í játtanarskjali er runnin, verður stuðul afturførdur.

Av talvuni niðanfyri framgongur, hvussu gongdin viðvíkjandi játtaðum stuðli hevur verið í 2005 og undanfarin ár.

	Játtað	Útgoldið og afturført áður	Skyldugt 1. januar 2005	Útgoldið í 2005	Afturført í 2005	Skyldugt ultimo
	kr.	kr.	kr.	kr.	kr.	kr.
Vinnuframagrunnurin						
2002	6.915.539	-6.778.575	136.964	-123.607	-13.357	0
2003	6.497.398	-5.451.148	1.046.250	-994.176	-52.074	0
2004	5.618.899	-3.324.900	2.293.999	-1.433.518	-78.498	781.983
2005	4.699.058	0	0	-2.822.908	-510.861	1.365.289
Skyldugur stuðul ultimo 2005	23.730.894	-15.554.623	3.477.213	-5.374.209	-654.790	2.147.272

6. ONNUR ARBEIÐI

Umframt grannskoðanina av ársroknskapinum fyri 2005 hava vit síðan grannskoðanarprotokollina frá 11. mars 2005 gjørt niðanfyri standandi arbeiði fyri grunnin:

- Sett upp roknskapin fyri 2005.

7. AÐRAR UPPLÝSINGAR

7.1 Veðsetingar, eventualskyldur o.a.

Tær veðsetingar og eventualskyldur, sum hvíla á Vinnuframagrunninum, framganga av notu 11 til ársroknskapin.

Vit hava fingið váttan frá leiðsluni um, at hesar upplýsingar, leiðsluni kunnugt, eru fullfíggjaðar.

7.2 Tryggingarviðurskifti

Leiðslan hevur upp á fyrispurning okkara upplýst, at bygningurin er tryggjaður til full- og nývirði ímóti skaða av eldi og øðrum bygningsskaða smb. nærri lýstum tryggingartreytum. Skrivstovu- og edv-útgerðin er tryggjað fyri 500 tkr.

Grunnurin hevur ikki teknað rakstrartapstrygging.

Okkara grannskoðan hevur ikki fevnt um tryggingarviðurskiftini. Stjórin hevur sagt okkum, at tryggingar eru teknaðar í so stóran mun, at ognir grunsins, og grunnurin sum heild, verða mett forsvarliga tryggjað.

Vit mæla til, at tryggingar hjá grunninum verða gjøgnumgingnar og dagførdar í minsta lagi eina ferð um árið.

7.3 Eftirlit við gerðabókini hjá stýrinum

Vit hava lisið gerðabókina hjá stýrinum fram til fundin hin 22. februar 2006.

7.4 Roknskaparváttan stjórnarinnar

Sambært góðum grannskoðanarsiði hava vit frá stjóranum fingið eina undirskrivaða roknskaparváttan, har váttað verður, at ársroknskapurin er fullfíggjaður, viðvíkjandi t.d. veðsetingum, veiting av trygdum, rættarmálum, hendingum eftir roknskaparárslok og viðvíkjandi øðrum økjum, ið eru torfør at grannskoða.

8. GRANNSKOÐANARVÁTTAN Í SAMBANDI VIÐ ÁRSROKNSKAPIN FYRI 2005

Sambært galdandi lóggávu um virksemið hjá løggildum grannskoðarum verður váttað,

at undirritaði lýkur tær í lóggávuni ásettu habilitetstreytir, og

at undirritaði í sambandi við grannskoðanina hevur fingið allar upplýsingar, sum biðið er um.

Tórshavn hin 22. mars 2006

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor

Framløgd á fundi hin / 2006

Stýrislimir:

Gloria Kalsø
formaður

Alexander Samuelsen

Magnus Danielsen

Marita Rasmussen

Gissur Patursson

Vinnuframagrunnurin

Ársroknskapur fyri 2005

Correspondent Firm of
KPMG International
a Swiss Cooperative

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

Heiðavegur 15 · Postboks 190
FO-600 Saltangará · Faroe Islands
Telefon +298 474 474
Telefax +298 474 475

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sp/f. no. 2732

INNIHALDSYVIRLIT

	SÍÐA
UPPLÝSINGAR UM GRUNNIN	2
ÁRSFRÁGREIÐING	3
ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR	5
GRANNSKOÐANARÁTEKNING	6
NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR	7
RAKSTRARROKNSKAPUR	8
FÍGGJARSTØÐA	9
NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN	11

UPPLÝSINGAR UM GRUNNIN

Vinnuframagrunnurin
Hoyvíksvegur 51
100 Tórshavn

Telefon 31 27 94
Telefaks 31 67 03
Heimasíða www.vfg.fo
Teldupostur vfg@vfg.fo

Roknskaparár nr. 5
Heimstaður: Tórshavn

Stjórn
Ólavur Arge

Grannskoðari
SPEKT statsaut. revisorar Sp/f
Correspondent Firm of *KPMG* International

Peningastovnar
Føroya Sparikassi
Postgirostovan
Landsbanki Føroya

ÁRSFRÁGREIÐING

Virksemi

Vinnuframagrunnurin varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframagrunn. Endamálið við Vinnuframagrunninum er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemi og umsiting hjá Vinnuframagrunninum varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrisins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi umsitur Vinnuframagrunnurin eisini stuðulsskipan til skipasmíð.

Árið 2005

Rentuinntøkurnar vóru 1.023 tkr. í 2005 móti 1.285 tkr. í 2004.

Vinnuframagrunnurin hevur í 2005 viðgjørt 40 umsóknir, harav 24 umsóknir vóru játtaðar. Í stuðli vóru veittar 4.699 tkr., brutto, meðan 655 tkr. eru afturførdar. Nettostuðulin var sostatt 4.044 tkr.

Eginognin við árslok var 51.795 tkr., herav er stovnsfæið 43.364 tkr.

Við árslok 2005 er skyldugur stuðul 2.147 tkr.

Hagtøl

Játtaði stuðulin hjá grunninum hevur háttað seg soleiðis (í túsund krónum):



	2001	2002	2003	2004	2005	Í alt
Vinnuframaátøk	-	2.722	1.672	1.605	1.100	7.099
Menning	-	643	158	809	1.561	3.171
Marknaðarføring	1.013	3.611	4.567	2.487	2.000	13.678
Aðrar	-	788	100	291	38	1.217
	1.013	**7.764**	**6.497**	**5.192**	**4.699**	**25.165**

Samlað fyri árini 2001-2005 hevur býti verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli:



ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Stjórn og stýri hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2005 og ársfrágreiðingina.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparásetingar. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd.

Tórshavn hin 22. mars 2006

Stjórn:

Ólavur Arge

Stýrið:

Gloria Kalsø

Alexander Samuelsen

Gissur Patursson

Marita Rasmussen

Magnus Danielsen

GRANNSKOÐANARÁTEKNING

Vit hava grannskoðað tann av leiðsluni gjørda ársroknskap fyri 2005 fyri Vinnuframagrunnin.

Framda grannskoðanin

Vit hava fyrireikað og framt grannskoðanina í samsvari við vanliga góðkendar føroyskar grannskoðanarreglur við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin ikki inniheldur týðandi feilir og manglar. Út frá eini meting um týdning og vanda hava vit undir grannskoðanini eftirkannað grundarlagið og skjalprógvið undir teimum í ársroknskapinum uppsettu upphæddum og upplýsingum annars. Í hesi hava vit tikið støðu til nýttu roknskaparreglurnar og roknskaparligu metingarnar og hava mett, um upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Niðurstøða

Okkara fatan er, at ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við krøvini í føroysku lóggávuni um roknskaparframløgu, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum grunsins, tí figgjarligu støðuni og úrslitinum.

Tórshavn hin 22. mars 2006

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor

Annfinn Simonsen
cand.merc.aud.

NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

Ársroknskapurin fyri Vinnuframagrunnin fyri 2005 er gjørdur eftir hesum roknskaparreglum, ið eru tær somu sum fyri undanfarin ár.

Rakstrarroknskapurin
Inntøkur og útreiðslur eru tíðargreinaðar til roknskaparárið.

Materiell støðisogn
Grundað á at marknaðarvirði á bygningi grunsins er mett at verða hægri enn bókað virðið, verður bygningurin ikki avskrivaður roknskaparliga. Bygningurin hevur ikki verið avskrivaður síðan 1997.

Skattur og mvg
Vinnuframagrunnurin er ikki skattskyldugur og ikki mvg-skrásettur.

RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI 2005

Nota		2005 kr.	2004 kr.
	11 Lønir v.m.	-690.178	-670.956
1	14 Keyp av vørum og tænastum	-267.281	-439.941
2	15 Keyp av útbúnaði, netto	0	-4.800
3	16 Leiga, viðlíkahald og skattur	-190.398	-164.223
4	75 Skráseting av keyps-mvg	-106.599	-142.329
	Útreiðslur og íløgur til samans	-1.254.456	-1.422.249
	21 Søla av vørum og tænastuveitingum	519.940	550.940
5	52 Eftirløn til fráfarnan stjóra	-68.545	-67.665
	53 Stuðul til vinnu	-4.044.262	-4.681.930
6	67 Rentuinntøkur	1.022.825	1.285.038
	Nettoútreiðslur til samans	-3.824.498	-4.335.866
	03.63 Játtan av løgtingsfiggjarlógini	4.750.000	5.000.000
	Ársúrslitið	925.502	664.134

Ársúrslitið verður flutt til komandi ár.

FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2005

Nota		31/12 2005 kr.	31/12 2004 kr.
	OGN		
	Støðisogn		
7	**Materiell støðisogn**	5.108.481	5.108.481
	Grundøki og bygningar	19.700	19.700
	Rakstrartól og innbúgv	5.128.181	5.128.181
		5.128.181	5.128.181
	Støðisogn til samans	55.071.956	53.600.914
8	**Tøkur peningur**	55.071.956	53.600.914
	Áogn og tøkur peningur til samans	60.200.137	58.729.095
	OGN TIL SAMANS		

FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2005

Nota		31/12 2005 kr.	31/12 2004 kr.
	SKYLDUR		
9	**Eginpeningur**	43.363.618	43.363.618
	Stovnsfæ	8.431.031	7.505.530
	Fluttur vinningur	51.794.649	50.869.148
	Eginpeningur til samans		
	Skuld		
	Stuttfreistað skuld	6.258.215	4.382.734
	Millumrokning við landskassan	2.147.273	3.477.213
10	Játtaður, ikki útgoldin, stuðul	8.405.488	7.859.947
	Skuld til samans	60.200.137	58.729.095
	SKYLDUR TIL SAMANS		
11	**Eventualskyldur og veðsetingar**		

NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

		2005 kr.	2004 kr.
1	**11 Lønir v.m.**		
	11.10 Mánaðarlønt	413.668	403.126
	11.40 Samsýningar, viðbøtur o.a.	208.002	202.100
	11.60 Arbeiðsmarknaðargjøld	11.175	9.852
	11.70 Eftirlønargjøld	57.333	55.878
		690.178	670.956

Samsýningin til stýrið í 2005 er 197 tkr. (2004: 183 tkr.)

2	**14 Keyp av vørum og tænastum**	6.868	15.250
	14.20 Umboðan	49.670	34.312
	14.69 Keyp av vørum annars	12.621	13.550
	14.70 Telefon	5.613	4.214
	14.71 Postgjøld	8.200	54.740
	14.72 Grannskoðanartænastur og sakførari	14.355	13.355
	14.73 Trygging	51.005	15.520
	14.74 Keyp av edv-vørum og tænastum	118.949	289.000
	14.79 Keyp av tænastuveitingum annars	267.281	439.941

3	**15 Keyp av útbúnaði, netto**	0	4.800
	15.20 Telduútbúnaður og edv-menning	0	4.800

NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

4 16 Leiga, viðlíkahald og skattur

		2005 kr.	2004 kr.
16.51	Viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar	190.098	163.523
16.10	Leiga av hølum	300	700
		190.398	164.223

5 21 Søla av vørum og tænastuveitingum

21.50	Húsaleiga	519.940	477.940
21.92	Onnur søla av tænastum	0	73.000
		519.940	550.940

NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

6 53 Stuðul til vinnu

	2005 kr.	2004 kr.
Játtaður stuðul, brutto	4.699.058	5.618.899
Afturførður stuðul	-654.796	-936.969
Játtaður stuðul, netto	4.044.262	4.681.930
Játtaður stuðul, brutto		
00-00 Vinnuframaátøk	1.100.000	1.705.000
01-01 Menning av vørum og tænastum	883.408	615.080
01-03 Menning av telduforritum og KT-loysnum	277.514	193.680
01-05 Menning av tænastum innan ferðavinnuna	67.400	0
01-06 Nýskapandi verkætlanir	333.333	0
02-01 Vørumessur	1.526.825	1.623.269
02-02 Tilevning av sølutilfari	0	484.970
02-03 Sølufremjandi tiltøk og marknaðarkanningar	472.628	405.650
03-01 Kanningarætlanir	0	591.250
03-02 Patentumsókn	37.950	0
Til samans	4.699.058	5.618.899
Afturføringar		
Afturførður stuðul, Grunnur Ferðavinnunnar	0	-326.154
00-00 Vinnuframaátøk	-363.505	-86.114
01-01 Vørumenning	-76.159	0
02-01 Vørumessur	-33.253	-397.557
02-02 Tilevning av sølutilfari	0	-70.132
02-03 Sølufremjandi tiltøk og marknaðarkanningar	0	-57.012
03-02 Patentumsókn	-37.950	0
Afturførður stuðul, Vinnuframagrunnurin gomul ár	-143.929	0
Til samans	-654.796	-936.969
Játtaður stuðul, netto	4.044.262	4.681.930

NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

7 Materiell støðisogn

	Grundøki/ bygningar	Rakstrar- tól og innbúgv
Útveganarvirði 31. desember 2005	12.608.481	44.540
Avskrivingar 31. desember 2005	-7.500.000	-24.840
Roknskaparligt virði 31. desember 2005	5.108.481	19.700

8 Tøkur peningur

	31/12 2005 kr.	31/12 2004 kr.
Innistandandi í Føroya Sparikassa	1.163.903	692.261
Innistandandi í Postgirostovuni	20.876	27.610
Landsbanki Føroya	53.887.177	52.881.043
	55.071.956	53.600.914

9 Eginpeningur

Stovnsfæ		
Stovnsfæ 1. januar	43.363.618	43.358.043
Útgjald til advokat fyri sølukostnað av grundøkjum	0	-4.425
Borgan, Ábyrgdargrunnurin	0	10.000
Stovnsfæ 31. desember	43.363.618	43.363.618
Fluttur vinningur		
Fluttur vinningur 1. januar	7.505.529	6.841.396
Ársúrslit	925.502	664.134
Fluttur vinningur 31. desember	8.431.031	7.505.530

NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

10 Játtaður, ikki útgoldin stuðul

	31/12 2005 kr.	31/12 2004 kr.
Skyldugur stuðul 1. januar 2005	3.477.212	3.250.200
Játtað í árinum	4.699.058	5.618.899
Útgoldið í árinum	-5.374.201	-4.454.917
Afturført	-654.796	-936.970
Játtaður, ikki útgoldin stuðul 31. desember 2005	2.147.273	3.477.212

11 Eventualskyldur og veðsetingar

Grunnurin hevur eftirlønarskyldu mótvegis fyrrverandi stjóranum hjá Føroya Ídnaðargrunni.

Vinnuframagrunnurin hevur frá Ábyrgdargrunninum yvirtikið borgsváttan mótvegis peningastovni. Henda sær út til at gerast effektiv við 500 tkr. í nærmastu framtíð.

Støðisogn og ognarlutir eru ikki veðsettir.